# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Fyri 30 árum síðan:

## Sjónvarpsfelagið

Fyrsta sendiloyvi til føroyskar sjónvarpssendingar varð givið Sjónvarpsfelagnum í Havn í november 1978.

Ein meiriluti í landsstýrinum samtykti at geva Sjónvarpsfelagnum heimild til at gera royndarsendingar, til alment sjónvarp byrjar.

Seinni góðkendi Post & Telegrafverkið sendiloyvið, og í apríl 1979 byrjaðu regluligarsjónvarpssendingar.

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1979*



*Torbein Rein í sendihølinum hjá Sjónvarpsfelagnum í 1978*



*Elin Mouritsen og Óli Kurt Hansen í eini av teimum fyrstu sjónvarpsupptøkunum, ið var ein barnasending, sum Torbein Rein tók upp fyri Sjónvarpsfelagið*

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Petur Jacob Vágsá**, vanliga nevndur Piddi í Búðinum, Klaksvík, fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikukvøldið klokkan 18 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 13.30. Sungið verður úr sálmabókini.

**Bjarki Hjelm**, ættaður úr Vági, búsitandi í Keypmannahavn, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum mánadagin, 72 ára gamal.

**Ruth Berg í Hvalba**, ættað úr Vági, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum mánadagin 24. november, 50 ára gomul.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá ið mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Elsebeth Kristina (Ebba) Wang**

doyði og varð jarðað.
Takk til Hera Joensen prest fyri troystarrík orð í hospitalskapellinum, í kirkjuni í Hoyvík og við grøvina í Kaldbak.
Vit takka teimum, sum hjálptu okkum í sambandi við jarðarferðina, eins og teimum, sum sóu so væl um hana hennara síðstu tíð á landssjúkrahúsinum.
Tøkk fyri heilsanir og gávur til kirkjuna í Hoyvík.
Tøkk til øll sum fylgdu.

*Vegna tey avvarðandi*

**Eyðun, Zakarias, Sølvá, Hanus og Mourits**

## Tórshavnar Manskór í Kvívík

Sunnudagin 30. november kl. 17 verður jólakonsert við Tórshavnar Manskóri og Hera Joensen presti í Kvívíkar Kirkju.

Eftir konsertina verður kaffi og køkur til øll.

Øll eru hjartaliga vælkomin.



**Dagurin:**
**26. november. Konrad**, deyður ár 975. Týskur fúrstasonur, sum seinni bæði gjørdist dómpróstur og biskupur. Hann læt byggja bæði kirkjur og sjúkrahús og kleystur. Varð skýrdur halgimenni í 1123.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!